# Seyður á vegunum ein deyðsfella



*Higartil hava myndugleikarnir latið eyguni aftur fyri hesi deyðsfellu, sum øll, sum koyra á vegunum hvønn einasta dag mugu liva við*

*Mynd: Rúna Sivertsen*



*Tryggingarfeløgini rinda millión upphædd krónur árliga fyri skaðar upp á bilar, har seyður er atvoldin til óhappið*

*Mynd: Rúna Sivertsen*

**Fyri stuttum hendi eitt álvarsamt ferðsluóhapp, har fleiri unglingar vóru í bilinum. Ein atvoldin til óhappið var ein seyður á vegnum, sum bilførarin mátti bremsa harðliga fyri**

FERÐSLUTRYGD

Seyður á vegnum er atvoldin til í minsta lagi 100 ferðsluóhapp árliga. Nøkur av hesum ferðsluóhappum eru sera álvarsom.

Hvat ferðsluskaðar, orsakað av seyði á vegunum, kosta samfelagnum samanlagt er ikki gjørd nøkur útrokning uppá. Men so mikið er í hvussu er greitt, at tryggingarfeløgini rinda millión upphædd krónur árliga fyri skaðar upp á bilar, har seyður er atvoldin til óhappini.

Haraftrat kemur kostnaðurin av persónsskaða við sjúkudøgum og varandi meini.

Higartil hava myndugleikarnir latið eyguni aftur fyri hesi deyðsfellu, sum øll, ið koyra á vegunum, hvønn einasta dag mugu liva við.

**Stika fram við vegnum**

Í álitinum um nullhugsjónina, sum nú er samtykt í løgtinginum, mælir Ráðið fyri Ferðslutrygd til, at stikað verður fram við vegunum.

Politiski myndugleikin noyðist at taka hetta vandamál í álvara, soleiðis at arbeiðið at skilja ferðslu og fenað frá hvørjum øðrum verður gjørt.

**Tilmæli frá Ráðnum fyri Ferðslutrygd**

- at stikað verður framhaldandi fram við vegunum, so at ferðsla og fenaður verða skild hvørt frá øðrum,
- at ávaringarskelti um seyð verða sett upp við vegjaðaran, har seyðahús og seyðasmogur eru, og hoyggj verður givið,

*Kelda: www.ferdslutrygd.fo*

# Volvo XC90 til pávan

**Volvo Cars hava latið ein myrkabláan Volvo XC90 til Benedict XVI páva. Lyklarnir vórðu handaðir pávanum undir ein móttøku í Vatikaninum mikudagin 28. juni**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Mikudagin 28. juni 2006 fekk Benedict XVI pávi lyklarnar til ein spildurnýggjan Volvo XC90, som Volvo Car Corporation hevur givið honum.

Bilurin varð latin pávanum undir eini móttøku í Vatikaninum. Hjástødd vóru eisini umboð fyri Volvo Car Corporation og Volvo Auto Italia.

Talan er um ein Volvo XC90 við V8 motori, ið er sergjørdur til pávan.

Bilurin er myrkabláur við ljósari kabinu.

*Benedict XVI pávi fekk ein spildurnýggjan sergjørdan Volvo XC90 frá Volvo Car Corporation*

